# Fekk dygga álitisváttan

**Starvið sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag verður nú fulltíðarstarv**

HAVNAR ARBEIÐSMANNAFELAG

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hans Joensen fekk dygga álitisváttan á aðalfundinum leygardagin, har ein stórur meiriluti av limunum valdi hann aftur til formann*

Hans Joensen fær í hvussu so er tvey ár afturat sum formaður í havnar Arbeiðsmannafelag

Tað varð avgjørt á aðalfundi í felagnum leygardagin.

Og tað var heldur ongin ivi um, hvønn limirnir vilja hava til formann.

Tvey valevni vóru, men Hans Joensen fekk heilar 163 atkvøður. Mótvalevni hansara, Jóan Karl Dam, fekk 44 atkvøður.

– Tað taki eg sum eina dygga álitisváttan, sigur Hans Joensen.

Samstundis avgjørdi aðalfundurin, at formansstarvið í Havnar Arbeiðsmannafelag hereftir skal vera fulltíðarstarv.

Sostatt fer Hans Joensen nú úr sínum starvi á Fiskavirking og fer í starv í Havnar Arbeiðsmannafelag fulla tíð.

Hann sigur, at í fjør var hann 45 dagar úr arbeiði í sambandi við formansstarvið í Havnar Arbeiðsmannafelag.

– Tað eru ikki allir arbeiðsgevarar, sum høvdu góðtikið tað, men eg má siga, at í Fiskavirking hava tey verið ógvuliga lagalig, sigur hann.

Annars stóru tvey nevndarlimir í Havnar Arbeiðsmannafelag fyri vali á aðalfundinum leygardagin. Teir vóru Zakaris Hansen og Kári Olsen og teir vórðu báðir afturvaldir. Í nevndini eru harafturat Zaharias Thomassen og Jan Midjord.

### Sáttmálin sigast upp

À aðalfundinum varð eisini spurningurin umrøddir um sáttmálin skal sigast upp ella ikki. Hans Joensen sigur, at aðalfundurin var einmælt samdur um, at sáttmálin skal sigast upp Tað ivast formaðurin heldur ikki í, at nevndin at taka til eftirtektar, soleiðis sum landið liggur í løtuni.

Tó leggur hann dent á, at enn er onki avgjørt um, hvørji krøv felagið fer at seta í samráðingunum.

Sáttmálin gongur út 30. apríl.

Men Hans Joensen sigur, at tað er ikki bara lønir, tað snýr seg um. Talan kunnu eisini vera um aðrar ábøtur í sáttmálanum enn sjálv lønin.

Hann leggur tó dent á, at við hesum hevur hann ikki sagt, at ongi lønarkrøv verða, tí tað er als ikki avgjørt enn.

Men hann heldur framvegis, at verkafeløgini kunnu ikki góðtaka, at gjóvin ímillum verkafólkið og lønarbólkarnar við betri løn, alsamt gerst djúpari og breiðari.

Í tí sambandi átalaði hann enn einaferð skattalættan, sum landsstýrið hevði latið.

– Vit sóu beinanvegin at hesin skattalætti ikki í nóg stóran mun kom vanliga arbeiðaranum tilgóðar og tí gjørdu vit beinanvegin vart við okkara misnøgd.

Eitt nú vóru feløgini á fundi við fíggjarnevndina

– Sum so ofta, tá tú tosar við politikarar, tykjast teir at lurta. Men tá tað kemur til stykkis, kemur ofta stígur í og soleiðis var eisini hesuferð.

– Har var onki at gera, helst tí at flokkarnir í sjálvum samgongusamráðingunum, høvdu gjørt eina avtalu um, hvussu skattalættin skuldi vera, segði Hans Joensen áaðalfundinum.

Áfundinum avsannaði hann eisini leysasøgur um, at Havnar Arbeiðsmannafelag ætlar at leggja saman við Føroya Arbeiðarafelag.



*Yvir 200 limir vóru á aðalfundi í Havnar Arbeiðsmannafelag leygardagin og teir taka allir undir við, at sáttmálin við arbeiðsgevararnar verður sagdur upp*

## Leggja upp til meiri samstarv í Suðuroy

**Bygdaráðið í Porkeri mælir til at seta eina barnavernd fyri alla Suðuroy og í bygdaráðnum í Hvalba verður mælt til at øll oyggin setir ein felags brandmeistara**

SAMSTARV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í Suðuroynni verður framvegis tosað nógv um samstarv. Í teimum ymsu bý- og bygdaráðunum í oynni, hava tey tó ilt við at fáa eyga á tey stóruframbrotini á hesum øki.

Men nú rógva so tvær av teimum minnu kommunum í oynni í øllum førum uppundur at fáa meiri samstarv í oynni- í tí smáa.

Í báðum bygdaráðunum er sjónarmiðið, skal talan vera um meiri samstarv í oynni, kunnu tær ymsu kommunurnar vísa, at tær meina nakað við tað við at byrja í smáum.

Í Porkeri hevur bygdaráðið viðgjørt spurningin um barnavernd. Vágs Býráð hevur skrivað til Porkeris kommunu um at vera við til at gera eina felags barnavernd fyri Suðuroyar syðru helvt.

Bygdaráðið í Porkeri vísir ikki tankanum frá sær. Men bygdaráðið heldur, at tað rættasta er at skipa eina felags barnavernd fyri alla Suðuroynna.

Sostatt samtykti Porkeris Bygdaráð einmælt at mæla hinum kommununum til at skipa eina felags barnavernd fyri alla oynna.

Bygdaráðið samtykti eisini at bjóða hesi felags barnaverndini høli í Porkeri til umsiting.

Hvalbingar halda eisini, at tað er rætt at byrja í tí smáa.

Á Tvøroyri hevur býráðið søkt eftir nýggjum brandmeistara fyri Áka Dimon, sum fer frá fyri aldur.

Á bygdaráðsfundi í Hvalba fríggjakvøldið var eitt sjónarmið, at tað rættasta hevði verið at sett ein brandmeistara fyri alla Suðuroynna, sum so kundi havt umsjónina við sløkkiliðsamboðunum í allari oynni.

Hetta varð tó ikki samtykt formliga, men Hvalba samstarvar við Tvøroyri um brandbil og tað lá í luftini, at bygdaráðið í Hvalba skuldi føra hesi sjónarmið fram, tá ið høvið beyðst.